# Umhvørvismedvit er ein fortreyt



*Heilsufrøðiliga starvsstovan heldur virkssemi í sambandi við oljuleitingina í Føroyum verða fult forsvarligt*

**Heilsufrøðiliga starvsstovan metir, at virksemið í sambandi við oljuboring, sum higartil hevur verið í Føroyum, er fult forsvarligt, og at føroysk virki kundu lært av oljufeløgunum. Tær umhvørvisligu treytir, sum eru settar oljufeløgunum eru ájavnt við tær, sum verða settar í okkara grannalondum.**

**Tey oljufeløg, sum hava royndarborað á føroyskum øki hava víst, at tey eru tilvitað um umhvørvið. Oljufeløgini hava sokallaðar umhvørvisstýriskipanir, sum m.a. byggja á, at virki sjálvi hava ein orðaðan umhvørvispolitikk, umhvørvismál og mannagongdir fyri umhvørvisvernd**

SUNI PETERSEN
*Umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni*

### Fyrireiking til oljuvinnuna

Tá avgerð var tikin um at farast skuldi undir oljuleiting í Føroyum, máttu føroyskir umhvørvismyndugleikar fyrireika seg til at taka ímóti oljuvinnuni. Umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni hevur samstarvað við umhvørvismyndugleikarnar í okkara grannalondum, og er okkara fyrisiting í stóran mun bygd á teirra royndir, serliga tær norsku.

Kunngerðir og reglur eru gjørdar fyri oljuvinnuna. Serliga kunnu nevnast kunngerðin um nøtslu og burturbeining av evnum og tilfari frá havstøðum og kunngerðin um heilsu, trygd og umhvørvi í samband við leitivirksemi, sum báðar komu í 2001. Hesar kunngerðir seta treytir fyri hvussu virksemið skal skipast, um nøtslu av kemiskum evnum o.a.

Eisini verður m.a. kravt, at áðrenn oljuleitingin byrjar, skal gerast ein umhvørvisfylgjumeting, har oljufeløgini skulu gera metingar av hvørjar avleiðingar virksemið kann hava á náttúru og umhvørvi, og hvussu virksemið kann fara fram umhvørvisliga forsvarliga.

### Útbjóðing av økjum

Áðrenn oljufeløgini fingu tillutað øki til oljuleiting, var tað eitt krav, at tey skuldu greiða okkum frá teirra politikki, málum og mannagongdum á umhvørvisøkinum. Í sambandi við viðgerðina av umsóknunum varð stórur dentur lagdur á umhvørvisførleikan hjá feløgunum.

Saman við umsóknunum um leitiloyvi var umfatandi tilfar um náttúruna á økinum, sum søkt varð um, umframt frágreiðingar um møgulig kemisk evnu, sum fóru at verða nøtt, burturbeiningarhættir o.a.



### Loyvi til royndarboringar

Sum kunnugt vóru tríggjar royndarboringar í 2001, og hevði Heilsufrøðiliga starvsstovan ábyrgd av at virksemið fór fram á ein umhvørvisliga nøktandi og tryggan hátt. Oljufeløgini skuldu hava góðkenning frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni áðrenn boringarnar byrjaðu.

Bert evni, sum ikki eru skaðilig fyri náttúruna vórðu góðkend. Í viðgerðini av umsóknunum hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan hildið seg til altjóða reglur um nøtslu av kemikalium í sambandi við boring. Hetta er tann sonevndi OSPAR sáttmálin til verju av havumhvørvinum í landnyrðingsatlantshavinum, sum Føroyar tóku undir við í 1998. Nevnast kann, at Føroyar vóru eitt av fyrstu londunum, sum nøtti tær nøggju reglurnar um góðkenning av evnum í sambandi við boring, sum komu í gildi í 2000.

### Umhvørviskanningar

Fyri at fáa eitt grundarlag at fylgja við í um virksemið ávirkar umhvørvið, kravdi Heilsufrøðiliga starvsstovan at oljufeløgini gjørdu lívfrøðiligar og evnafrøðiligar kanningar av havbotninum áðrenn oljuleitingin byrjaði.

Á sumri í 2001 gjørdu øll oljufeløgini í felag eina kanning av tí samlaða økinum har boringarnar fóru fram. Harumframt hevur hvørt einstakt oljufelag kannað og lýst umhvørvið nærhendis sjálvum brunninum, bæði áðrenn og aftaná boringina.

### Eftirlit

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur, meðan boringarnar fóru fram, verið á eftirliti á boripallunum, har nøtt evni, útbúnaður, mannagongdir o.a. vórðu kannað.

Úrslitið var í øllum trimum førum, at mannagongdir og nøtt evni vóru í samsvari við tey givnu loyvini, og at feløgini høvdu væl útbygdar skipanir til at ansa eftir, at umhvørvið ikki verður dálkað. Tað er ikki óvanligt, at innanhýsis krøvini hjá feløgunum eru strangari enn myndugleikakrøvini.



# Bjartar framtíðarvónir um svarta gullið



*Á útgerðarstøðini í Runavík hevur verið stegður í eina tíð. Virksemið verður so aftur í juni næsta ár*

**Felagið Atlantic Supply Base í Runavík hevur góðar vónir til AGIP boringina komandi ár. Lassi Borðoy sigur tó, at enn ganga nøkur ár, áðrenn nakað veruliga merkist til árinini frá oljuvinnu í Føroyum, so tað krevst, at ein kann finna sær ymiskt annað at takast við, meðan bíðað verður**

OLJUVINNA
*Dagfinn Olsen*

Lassi Borðoy frá felagnum Atlantic Supply Base sigur seg hava stórar vónir til AGIP boringina næsta ár.

- Vónirnar eru góðar. Og at teir hava funnið olju hinumegin markið ger jú, at ein kann hava góðar vónir, sigur Lassi Borðoy.

Hann ásannar tó, at enn gongur rúm tíð, áðrenn nakað veruliga merkist til oljuvinnu í Føroyum.

- Eg er spentur uppá, hvussu leikur fer, men talan er ikki um løtuvinning, og einki hendir heldur næsta ár. Tað ganga nøkur ár, áðrenn nakað hendir, sigur Lassi Borðoy.

### Sløkkja ljósið eina tíð

Spurdur, hvussu ein so rekur eitt felag, sum Atlantic Supply Base, tá bíðitíðin er so long, sigur Lassi Borðoy, at so er at steðga á eina tíð.

- Neyðugt er at steðga eina tíð. Ein má sløkkja ljósið og fara í annað arbeiði, til klárt er at byrja aftur, sigur Lassi Borðoy, sum eisini er í hálvum starvi sum sjómanskúlalærari.

- Vit arbeiða við at finna ymiskt annað at bjóða og arbeiða við, so vit t.d. hava aðrar tænastur at bjóða, men eru vit ikki komnir so langt við hesum, sigur Lassi Borðoy.

Neyðugt er at kunna umstilla seg og at duga eitt sindur av hvørjum, men Lassi Borðoy er greiður yvir, at neyðugt er at standa klárur alla tíðina, hóast niðursetta ferð, tí annars kann virksemið enda aðrastaðni.

- Hava vit einki at bjóða, tá oljan verður funnin, so er eg bangin fyri, at teir fara aðrar vegir við henni, og einki kemur hendaveg. Tað tekur langa tíð og leingi er at bíða. Tó hevði eg ikki roknað við, at tað fór at taka so langa tíð, sum tað hevur víst seg, sigur ein ærligur Lassi Borðoy.

Hann rekur Atlantic Supply Base í Runavík. Felagið hevur í samstarvsavtalu við Runavíkar havn ábyrgdina av allari útgerðini av alskyns slag, sum skal um føroyska bryggjukantin. Og føroyska útgerðarhavnin er samtykt at liggja í Runavík, so tað er ikki so lítið, sum er at taka sær av, tá virksemi er.

Í løtuni er bíðitíð og ljósið er ikki á fullum blussi í Atlantic Supply Base, men vónirnar eru sera bjartar.



*Lassi Borðoy, stjóri á oljuútgerðarstøðini í Runavík*

VÁGAR AIRPORT
At the Airport, the following offices and services are present:



¤ Civil Aviation Administration
¤ Airlines serving Vagar Airport
- Atlantic Airways
- Maersk Air
- Air Iceland
¤ Handling agencies
- Atlantic Airways
- Flogfelag Føroya
¤ Immigration / Police
¤ Regional Customs and Tax Administration
¤ Cafeteria
¤ Souvenir Shop
¤ Tourist- and information desk
¤ Bank (Føroya Banki)
¤ Car rental: AVIS and HERTZ

Statens Luftfartsvæsen
Vagar Airport
FO-380 Sørvágur
www.slv.dk/vagar
Tel. (+298) 35 44 00 · Fax (+298) 35 44 01 · e-mail: ekvg@slv.dk